# VIT LEITA EFTIR

## ÁRSINS LESIÁTAKI

EIGA TIT
BESTA
HUGSKOTIÐ?



NÁM

FØROYAR LESA

Les meira

Kapping

## ÁRSINS LESIÁTAKI Í FÓLKASKÚLANUM

# EIGA TIT BESTA HUGSKOTIÐ?

## VINN 5.000 KRÓNUR

**FØROYAR LESA leitar eftir ársins lesiátaki í fólkaskúlanum. Kappingin hevur til endamáls at leggja lunnar undir góðar lesivanar hjá næmingum.**

## Hvat er eitt lesiátak?

Eitt lesiátak kann vera at skipa fyri lesibingo, at gera ein bókavarða, at skipa lesiringar, bókasavnsvitjanir, lesimaraton, at gera sjónleik, sang, at framleiða poddvarp ella gera film ella annað burtur úr søgum ella okkurt heilt annað. Bara hugflogið setur markið.

## Hvør kann luttaka?

Kappingin er skipað sum opin kapping fyri allar deildir fólkaskúlans. Tey luttakandi kunnu til dømis vera skúlaflokkar, deildir, lesibólkar, skúlabókasøvn og onnur.

## Hvussu luttekur mann?

Hvør luttakandi bólkur skal lata inn eina frágreiðing um átakið. Frágreiðingin skal lýsa átakið við orðum, myndum og møguliga filmsbroti. Ynskiligt er, at endamálið við átakinum er greitt, og at næmingarnir hava verið virknir í átakinum.

**Tilfarið skal sendast til foroyarlesa@nam.fo**

## Freist

Freistin at lata inn frágreiðing og myndir, sum lýsa átakið, er 1. mai 2024. Vinnarin verður kosin 1. juni.

**Les meira á føroyarlesa.fo**

Í dómsnevndin eru lærarar, bókavørður, lesivegleiðari og umboð fyri Føroyar lesa.
Øll innkomin hugskot verða savnað í hugskotsbanka hjá Føroyar lesa.